

# Hevur tú fingið tað verri av viðgerð ella heilivági?

## - Vita, um tú hevur rætt til endurgjald

Patienterstatningen
– behandlings- og lægemiddelskader

Søk um endurgjald á
www.patienterstatningen.dk

Fylg málinum, inntil vit avgera,
um tú hevur rætt til endurgjald.

Á www.patienterstatningen.dk
kanst tú kanna, um tú møguliga
hevur rætt til endurgjald.

Brúka okkara netvegleiðing,
áðrenn tú søkir um endurgjald
frá okkum.

# Ert tú fevnd/ur av hesum?

**Øll**, sum fáa viðgerð ella keypa heilivág í Danmark, eru fevnd av Patienterstatningen og kunnu søkja um endurgjald.

Tú skalt hava fingið ein skaða av heiliváginum ella viðgerðini fyri at kunna fáa endurgjald.

Skaðar eftir viðgerð ella nýtslu av heilivági kunnu til dømis koma fyri:

- á sjúkrahúsinum
- hjá tínum lækna
- á røktarheiminum
- ella á bústovninum

Øll heilsufaklig viðgerð og allur heilivágur eru fevnd, uttan mun til, hvar viðgerðin er framd. Tað hevur heldur ikki týdning, um viðgerðin er farin fram á einum almennum ella privatum stovni.



# Viðgerðarskaðar

Tú kanst hava rætt til endurgjald, um tú hevur fingið ein likamligan ella sálarligan skaða í sambandi við t.d.:

- seinkaða viðgerð
- vantandi viðgerð
- skeiva viðgerð
- skeiva diagnosu
- mein eftir eina skurðviðgerð

Ein viðgerðarskaði kemur sum oftast fyri á sjúkrahúsinum, hjá egnum lækna, hjá einum tannlækna ella hjá einum serlækna. Men ein slíkur skaði kann eisini koma fyri aðrastaðni, t.d. á heilsumiðdepli, røktarmiðdepli ella fríróktarheimi. Tað kann t.d. vera ein skaði eftir eina ófullfíggjaða sárviðgerð, ein skaði í sambandi við endurvenjing, ella um tú hevur fingið skeivan heilivág.

Tú kanst trygt søkja um endurgjald, hóast tú heldur, at starvsfólkini hava gjørt sítt besta. Patienterstatningen kannar bara, um tú hevur fingið ein skaða, sum gevur tær rætt til endurgjald. Vit meta ikki um starvsfólkini.

Tú kanst eisini søkja um endurgjald, hóast tú visti, at tú játtaði at fáa eina viðgerð, sum kundi vera vandamikil.



Á min.medicin.dk finnur tú upplýsingar um næstan allan heilivág og hjáárin.

# Heilivágsskaðar

Tú kanst hava rætt til endurgjald, um tú fært sjáldsom og álvarslig hjáárin av heilivági. Tað kanst tú eisini, hóast tað var røtt viðgerð at geva tær heilivágin.

Ein heilivágsskaði kann koma fyri, meðan tú ert á sjúkrahúsinum, ella tá tú ert heima aftur.

Tað er ikki eitt krav, at tú skalt vera sjúklingur fyri at hava rætt til endurgjald. Til dømis eru nøkur hjáárin av p-pillarum, sum kunnu geva endurgjald til eina annars fríska kvinnu.

Tú kanst fáa endurgjald fyri álvarslig og sjáldsom likamlig og sálarlig hjáárin av heilivági. Tað er eisini galdandi, hóast tey eru lýst á kunningarseðlinum.

Men tú kanst ikki fáa endurgjald fyri mild og fyribils hjáárin.

# Soleiðis søkir tú

Tað eru fleiri hættir at søkja um endurgjald:

- Søk um endurgjald á www.patienterstatningen.dk við tínum MitID. Legg til merkis, at umsóknarskjalið er á donskum.
- Prenta út eitt umsóknarskjal, fyll út og send tað til okkara.
- Ring til Patienterstatningen, so senda vit eitt skjal.

Vit mæla til, at tú søkir um endurgjald á netinum – tað gevur tær eisini møguleika at fylgja við í málinum.

Tað er ikki neyðugt at hava ein sakførara. Velur tú kortini at brúka ein sakførara, skalt tú sjálv/ur rinda útreiðslurnar.



# Hvussu verður mett um ein skaða?

Tær mest brúktu reglurnar, tá vit meta um ein skaða:

- *Serfrøðingareglan:*
  Um vit meta, at tann mest royndi serlæknin á økinum hevði gjørt okkurt annað í sambandi við tína viðgerð, og skaðin kundi verið fyribyrgdur, hevur tú rætt til endurgjald sambært hesi regluni.

- *Líkindareglan:*
  Um øll hava gjørt tað, tey skuldu – eingin hevur gjørt nakað skeivt, men kortini situr tú eftir við álvarsligum avleiðingum – kanst tú hava rætt til endurgjald sambært hesi regluni.

  Vit meta m.a. um álvarsemið av sjúkuni, sum tú fekst viðgerð fyri. Jú sjúkari tú ert, tess fleiri avleiðingar mást tú nevniliga tola, tá tú samstundis fært viðgerð fyri tína sjúku, uttan at tað gevur tær rætt til endurgjald.

- *Apparaturreglan:*
  Um skaðin stavar frá feili í tøkniligari útgerð (t.d. røntgentóli, sproytu ella protesu, sum eru í ólagi), hevur tú rætt til endurgjald sambært hesi regluni.

# Títt endurgjald

Um skaðin verður góðkendur, gevur lógin tær møguleika at fáa endurgjald fyri:

- *Mista arbeiðsinntøku:*
  Inntøka, sum tú hevur mist, orsakað av skaðanum.

- *Mist arbeiðsføri:*
  Inntøka, tú kundi havt framyvir, um tú ikki hevði fingið skaðan.

- *Varandi mein:*
  Endurgjald fyri likamlig ella sálarlig árin, sum ikki fara burtur.

- *Pínu og sviða:*
  Endurgjald fyri hvønn sjúkradag, tú hevur havt, orsakað av skaðanum.

- *Heilsuútreiðslur og aðrir missir:*
  Útreiðslur til t.d. heilivág, fysioterapi, hjálparamboð og flutning, sum tú hevur havt orsakað av skaðanum.

Í sambandi við andlát kanst tú fáa endurgjald fyri tap av forsyrgjara, útreiðslur til jarðarferð og eina umleggingarupphædd til tey avvarðandi.

# Gott at vita

**Fyrningarfreistir**
Sambært lógini kann ein skaði gerast ov gamal. Í slíkum føri skal Patienterstatningen nokta at viðgera málið. Tað eru tvær fyrningarfreistir:

- 3 ár:
  Tað mugu ikki ganga meira enn 3 ár, frá tí tú finnur útav – ella átti at funnið útav – at tú hevur fingið ein skaða, til tú søkir um endurgjald. Eftir tað er málið fyrnað.

- 10 ár:
  Um fleiri enn 10 ár eru liðin, síðan tú fekst viðgerð ella fekst heilivág útflýggjaðan, er málið altíð fyrnað.

**Viðgerð ella heilivágur uttan fyri Danmark**
Møguleikarnir at fáa endurgjald eru einans galdandi, um tú hevur fingið viðgerð í Danmark, ella um heilivágurin er keyptur og útflýggjaður í Danmark ella gjøgnum eina danska heimasíðu.

Viðgerðarskaðar uttanlands verða bert endurgoldnir, um tú hevur fingið ávísing frá danska heilsuverkinum.

# Patienterstatningen

Patienterstatningen er tann myndugleikin í Danmark, sum ger av, um sjúklingar kunnu fáa endurgjald, um teir hava fingið ein skaða í heilsuverkinum ella hava fingið hjáárin av heilivági.

Øll, sum fáa viðgerð í Danmark, eru fevnd av endurgjaldsskipanini.

Tað er ókeypis at søkja um endurgjald frá Patienterstatningen.

Les meira um Patienterstatningen og tíni rættindi á www.patienterstatningen.dk

Tað er Patienterstatningen, sum gevur út henda faldaran.
5. útgáva, 2025.

**Patienterstatningen**
Kalvebod Brygge 45
1560 København V
Tel +45 33 12 43 43
Fax +45 33 12 43 41
Telefontíð 9.30-15.00 (danska tíð)

www.patienterstatningen.dk
pebl@patienterstatningen.dk

Mynd:
iStock: Monkey Business Images, forsíða / dragana991,
síða 4 /Drazen, síða 6 / ljubaphoto, síða 8.